**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ein blóðug lívsleið endað



**Abu Musab al-Zarqawi byrjaði sítt stríð ímóti russum og endaði tað ímóti amerikanarunum**

ZARQAWI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Longu sum hálvvaksin var hann ofta uppi í bardøgum og lógloysi í jordanska heimbýnum Zarqa, og sum 22 ára gamal endaði hann í fongsli, tí hann hevði brúkt knív. Her kom hann í samband við víðgongdar islamistar, og eftir ráðum frá teimum fór hann til Afghanistan at berjast ímóti russum, so skjótt hann slapp úr fongslinum.

Í 1992 kom hann aftur til Jordan, men longu stutt eftir heimkomuna bleiv hann tikin, tí løgreglan hevði funnið vápn og lóður í íbúð hansara. Hann varð dømdur 15 ára fongsul, tí sambært ákæruvaldinum hevði hann lagt ætlanir um at koyra kongsvaldið frá.

Í fongslinum fekk al-Zarqawi støðu sum politiskur fangi. Í 1999 bleiv hann latin leysur, tá Abdullah kongur gjørdi av at geva fangum grið í sambandi við, at hann tók við trúnuni.

Úr Jordan fór al-Zaeqawi til Pakistan, men longu í 2000 vildi jordanska løgreglan aftur hava fatur á honum, tí hon hevði illgruna um, at hann hevði lagt eina ætlan um at bumba gistingarhús í Jordan.

Úr Pakistan fór al-Zarqawi aftur til Afghanistan, har hann eftir øllum at døma kom í samband við Osama bin Laden, og við loyvi frá honum skipaði hann eina venjingarlegu hjá heilagum stríðsmonnum.

Hildið verður, at hann flýddi til Irak í 2001, eftir at amerikanarar høvdu bumbað venjingarlegu hansara. Undir hesum álopinum misti hann annað beinið. Amerikanska fregnartænastan vil vera við, at hann fjaldi seg í Norðurirak ta fyrstu tíðina, til bin Laden tilnevndi hann leiðara fyri tí heilaga krígnum í Irak.

Eingin veit við vissu, hvussu mong mannalív al-Zarqawi og hansara avgerðir hava týnt. Hildið verður fyri vist, at tað var hann, sum skipaði fyri einari rød av atsóknum í Casablanca og Turkalandi í 2003, har 108 fólk doyðu. Tað verður eisini hildið, at tað var hann, sum gav boð um at myrða Ayatollah al-Hakim í Irak, tá 51 fólk doyðu. Í einum brævi, sum amerikanararnir fingu hendur á, segði hann seg hava skipað fyri umleið 25 sokallaðum pínslarváttaratsóknum í Irak.

Jordansku myndugleikarnir halda fyri vist, at tað var al-Zarqawi, sum gav boð um at myrða amerikanska diplomatin Laurence Foley í Amman í oktober í 2002, og í Spania hava myndugleikarnir havt illgruna um, at hann hevði samband við bumburnar í Madrid fyri góðum tveimum árum síðani.

# Al-Zarqawi deyður

**Maðurin, sum sambært amerikanarunum hevur staðið fyri yvirganginum í Irak, er nú deyður**

ZARQAWI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Eg kann vátta, at Abu Musab al-Zarqawi er deyður í einum amerikonskum bumbuálopi norðan fyri Bagdad, segði ein fegin irakskur forsætisráðharri við tíðindafólk í morgun. Hann var ikki tann einasti, sum var fegin um tíðindini, tí lógvabrestirnir rungaðu leingi aftan á orð hansara.

– Hetta er samstundis ein boðskapur um, at vit og okkara trygdardeildir fara at halda fram við bardaganum ímóti yvirgangi, segði Nuri al-Maliki, forsætisráðharri.

– Hetta var gott, og hetta er ein góður dagur fyri Amerika, segði amerikanski sendiharrin í Bagdad.

Sambært amerikonsku herleiðsluni doyði al-Zaeqawi, tá amerikanskar tyrlur skutu eftir einum húsum einar 50 kilometrar í landnyrðing úr Bagdad. Generalurin Casy segði, at amerikanski herurin hevði staðfest, at talan var um al-Zarqawi, tí herurin hevði fingramerki hansara.

Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at tað hevur ljóðað, at tann illa gitni yvirgangsleiðarin er tikin ella deyður, men hetta er fyrstu ferð, at so týðandi keldur hava váttað tað.

Amerikanska herleiðslan hevur leingi hildið uppá, at tað var al-Zarqawi, sum skipaði fyri mótstøðuni í Irak, og USA hevði lovað 25 milliónir dollarar í finningarløn, bleiv hann funnin. Í fjør avdúkaði irakski innanríkisráðharrin, at irakskir trygdarhermenn tóku al-Zarqawi í 2004, men at teir lótu hann sleppa leysan, tí teir kendu hann ikki. Tá kom fram, at al-Zarqawi hevði fingið sær skegg, og at hann var fitnaður nógv.

**STUTT SAGT**

## Alifiskurin gav meiri enn villi fiskurin

Fyri fyrstu ferð vísa norsk hagtøl, at útflutningsvirðið á alifiski og vørum úr aldum fiski er størri enn útflutningsvirðið á úrdráttum úr villum fiski.

Frá 1. januar til 31. mai útflutti Noreg fisk og fiskavørur fyri 13,5 milliardir norskar krónur. Av hesum stavaðu 6,9 milliardir krónur fyri alifiski og vørum úr aldum fiski, meðan 6,6 milliardir krónur stavaðu frá úrdráttum úr villum fiski, skrivar Sunnmørsposten. Sambært blaðnum var útflutningsvirðið fimm teir fyrstu mánaðarnar tað størsta nakrantíð hendan partin av árinum. Eitt nú var virðið 1,6 milliard krónur ella 13,5 prosent størri enn í sama tíðarskeiði í fjør.

Tað er serliga tann góði laksaprísurin, sum hevur givið tey stóru tølini, men veksandi eftirspurningur eftir saltfiski og klippfiski munar eisini væl. Av ES-londunum eru tað serliga Frakland, Bretland, Spania og Póland, sum keypa nógvar fiskavørur úr Noregi, og Frakland er tað størsta keyparalandið. Men USA og Russland hava eisini keypt meiri fiskavørur úr Noregi, og klippfiskamarknaðurin í Brasil er størri enn nakrantíð.

## Vænta gos

Í Filipsoyggjunum hava myndugleikarnir biðið fólk nærhendis gosfjallinum Bulusan vera á varðhaldi, tí vandi er fyri, at fjallið fer at goysa. Gosfjallið, sum er miðskeiðis í landinum, hevur seinastu dagarnar goyst øsku einar tveir kilometrar upp í luftina.

Jarðfrøðistovnurin í Manila sigur, at jarðfrøðingar hava staðfest fleiri spreingingar inni í fjallinum, og at tær gerast altsamt títtari. Tær fyrstu spreingingarnar vóru longu í mars, og tá ávaraðu myndugleikarnir fólk ímóti at koma fjallinum ov nær. Síðani hevur fjallið sent stór roykskýggj upp í luftina minst fimm ferðir, seinast í gjár.

Bulusan er eitt tað mest virkna gosfjallið í Filipsoyggjunum. Í grannalandinum Indonesia hevur gosfjallið Merapi gjørt vart við í seinastuni, men jarðfrøðingarnir hara halda, at tað er minni vandi fyri gosi nú, tí tað hevur verið rættiliga friðarligt inni í fjallinum teir seinastu dagarnar.

## Avdúka KGB-agentar

Í Letlandi hevur tjóðartingið samtykt eina lóg, sum ger, at myndugleikarnir kunnu avdúka nøvnini á 4.500 agentum, sum arbeiddu fyri loyniligu sovjetsku løgregluna KGB. Men forsetin er ímóti at seta lógina í gildi, tí hann ber ótta fyri, at hon fer at elva til spjaðing í samfelagnum, og at fleiri, sum verða avdúkað, seinni kunnu vísa seg at vera ósek. Forsetin hevur í hvussu er partvíst rætt, tí fleiri, sum hava verið undir illgruna, hava verið før fyri at prógva, at tey eru ósek, skrivar AP.

Letland var undir sovjetskari herseting í næstan 50 ár, og í hesum árunum arbeiddu nógvir letlendingar hjá KGB. Umleið 24.000 letlendingar vóru agentar hjá KGB, men russar tóku at kalla øll skjøl við sær, tá teir tóku seg úr landinum í 1992. Eftir eru skjøl við nøvnunum á umleið 4.500 persónum, sum arbeiddu fyri KGB í 1992, og hesi nøvnini ætlar tjóðartingið at kunngera í almenna kunngerðarblaðnum í heyst.

Tað kann fáa avleiðingar fyri fleiri, tí eftir galdandi lóg kunnu fólk, sum hava havt tilknýti til KGB, ikki sita í almennum størvum í Letlandi.

## Gorbatjov ávarar Blair

Fyrrverandi sovjetski forsetin Mikhail Gorbatjov ávarar bretska forsætisráðharran, Tony Blair, ímóti at nøkta orkutørvin í Bretlandi við at byggja fleiri kjarnorkuverk afturat, skrivar blaðið The Guardian í dag.

– Kjarnorka loysir hvørki nútíðar orkutrupulleikarnar ella avbjóðingarnar í sambandi við veðurlagsbroytingarnar, skrivar Gorbatjov í brævinum til Blair.

Ávaringin hevur samband við eina frágreiðing, sum fyri einum mánað síðani staðfesti, at Bretland fer at hava stóran tørv á orku í komandi árum. Tá segði Blair, at hann fer at seta kjarnorkuna aftur á dagsskránna.